# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Nýggjar vinnur

Tað eru tey, sum halda, at fjølmiðlarnir fokusera alt ov nógv uppá tað negativa og mála eina alt ov myrka og dapurskygda mynd av støðuni og her eisini framtíðina hjá tí føroyska samfelagnum. Tað kunnu tað uttan iva vera nógvar ymsar meiningar um. Fjølmiðlarnir hava m.a. til uppgávu at lýsa støðuna sum hon er við hvørki at undirdríva ella yvirdramatisera.

Hinvegin er greitt, at ein áhaldandi fokusering uppá kreppu og trupulleikar kann geva ta fatan, at einki riggar og einki ber til og kann tað hava við sær mótloysi og enn størri dapurskygni. Tað er sum við kavabóltinum, sum er farin á rull.

Tað finnast so sannliga eisini nógvar sólskinssøgur í samfelagnum, og tað finnast í landinum fólk, sum veruliga tora og hava neyðuga hegni at bróta upp úr nýggjum. Dømi um hetta er júst valdi ársins leiðari, sum stendur á odda fyri eini blómandi alifyritøku, ið hevur viðgongd og sum er við til at menna hesa týðandi vinnu sum heild, ja sum bæði eggjar og mennir og gevur íblástur til onnur. Latið okkum tí eisini umrøða og fokusera uppá slík fólk, men eisini stovnar, feløg og felagsskapir, sum í sínum arbeiði so ella so arbeiða við nýskapan og menning. Besti hátturin at koma burtur úr eini kreppu ella torførari støðu er at framleiða/arbeiða seg burtur úr henni.

Tað finnast so eisini nógv onnur dugnalig fólk, sum arbeiða við nýskapandi vinnum her m.a. á KT økinum. Hetta eru eisini øki, sum Miðlahúsið við sínum fjølbroyttu miðlum, fer at seta fokus á komandi mánaðirnar. Bæði við at skapa neyðuga karmin, tvs. skipa fyri og bjóða fram húsið til fyrilestrar og fundir, sum so aftur kunnu geva íblástur til onnur. Nýggju tættirnir "Vinnan" í Sosialinum og "Vinnurásin" á Rás2 fara eisini at vera partur av hesum kveikjandi máli. Undir herrópinum "Nýskapandi vinnur" fara vit at seta ljóskastaran á bæði fólk, fyritøkur og stovnar, sum m.a. hava til endamál at fjøltátta og menna okkara vinnulív, bæði tað verandi og tað, sum liggur fyri framman.

**Sosialurin**

## Rættleiðing frá nevndini í Atlantic Airways



**CHRISTIAN ANDREASSEN**
nevndarformaður, vegna Atlantic Airways

Nú Kringvarp Føroya aftur hevur umrøtt partabrævahandilin 19. juni 2008 millum nevndina og leiðandi starvsfólk í Atlantic Airways, staðfestir nevndin, at onki nýtt er í málinum, og at skeiv tíðindi verða borin fram.

Nevndin í Atlantic Airways hevur í frágreiðing til Vinnumálaráðið 3. juli 2008 greitt gjølla frá málinum.

Í frágreiðingini varð greitt frá, at leiðslan í felagnum 14. juni 2008 boðaði frá, at hon vildi umskipa síni ognarviðurskifti í felagnum. Leiðslan hevði fingið eitt keypstilboð upp á partabrøvini fyri kurs 261 frá einum felag, sum frammanundan var ein av stóru partaeigarunum í Atlantic Airways.

Nevndin mælti frá, at hesin handil varð gjøgnumførdur, tí nevndin helt, at spurnartekn møguliga kundi verða sett við, hvussu óheft leiðslan fór at gerast mótevgis viðkomandi partaeigara.

Av hesi orsøk boðaði nevndin leiðsluni frá 16. juni 2008, at nevndin kundi ikki viðmæla handilin, og eftir hetta vórðu samráðingar tiknar upp millum nevnd og leiðslu um keyp av partabrøvum.

Havandi í huga, at leiðslan í Atlantic Airways hevði eitt keypstilboð upp á partabrøvini fyri kurs 261, at nevndin var av teirra áskoðan, at virðið á partabrøvunum var minst 240, og at ein íløga í hesi partabrøv fyri kurs 240 varð mett sum ein skilagóð íløga fyri felagið, tók nevndin tann 19. juni 2008 avgerð um at keypa 50 prosent av partabrøvunum hjá leiðsluni fyri kurs 240.

Nevndin fekk samstundis í lag eina management-avtalu, sum knýtti leiðsluna tættari at felagnum, tí nevndin hevði tá - eins og nú - fult álit á leiðsluni.

Nevndin hevur ongantíð vidgjørt persónligu búskaparligu viduriskifti hjá leiðsluni.Kringvarp Føroya hevur borið fram, at nevndin skal hava mett, at leiðslan ikki hevði skil á sínum fíggjarviðurskiftum, og at nevndin tí noyddist at forbarma seg yvir leiðsluna.

Nevndin hevur kravt at fingið hesar pástandir dementeraðar í Kringvarpinum, tí teir eru skeivir. Nevndin hevur hvørki sagt hetta við Kringvarp Føroya ella við Vinnumálaráðið.

## Gevist við Efta – farið eftir EU-limaskapi



**ANNFINN BREKKSTEIN**

ABC-samgongan eigur at gloyma alt um Efta-limaskap, tað er burturspilt arbeiðið, nú ið Ísland er á veg upp í EU. Hava vit samhandil við Noreg, Sveis, ella Listinstein, nei! Hetta er aftur ein av teimun kendu fólkafloksfilosofiunum, sum ongantíð bera á mál.

Uttanríksmálaráðharrin eigur ikki at sleppa at spæla meira, nú er tað framtíðin hjá Føroya fólki, sum telur. Vit eiga alt fyri eitt at kanna fyrimunir og vansar við EU-limaskapi, so at vit hava nakað ítøkuligt at taka støðu til.

Vit kunnu ikki lata vera við at taka avgerðir, tí so taka onnur tær fyri okkum. Vit mugu velja fyri at koma víðari, og tá man velur, velur man eisini frá. Nú ið íslendingar eru farnir á húsagang, er einki sum talar fyri einum Efta-limaskapi hjá okkum.

Stórur meiriluti er fyri EU-limaskapi í Íslandi og úr Bruxsell ljóðar, at teir kunn gerast limir longu í 2011. Um so er, eru vit enn einaferð eftirbátar og koma haltandi aftaná ófyrireikaðir sum altíð. Lat okkum nú ganga tær røttu leiðirnar og kanna fyrimunir og vansar við EU-limaskapi.

Eg takið fult undir við løgmanni okkara, tá ið hann sigur, at nú er nokk gitt, nú mugu vit vita. Eg takið fult undir við EU-limaskapi, tí tað er leiðin, ið kann fremja vøkstur og betri livikorð her á landi. Lat okkum gerast partur av framtíðini og veruliga fokusera á visiónir og framburð, ístaðin fyri at mjarra um Efta og fullveldi, sum einans avbyrgir okkum frá menning og framburði.

## Grundaða vónin!



**PÁLL Á REYNATÚGVU**
borgarstjóri á Sandi

Hefti meg við hesi orðini, nú tey nakrar ferðir eru lisin upp í Útvarpi Føroya. Tey eru eftir øllum at døma, úr einum áliti frá minnilutanum í vinnunevndini, viðvíkjandi vakstraravtalu fyri Suðuroynna. Eri púra samdur við niðurstøðuni hjá Bjørt Samuelsen og Kára P. Højgaard, um at Suðuroyingar eftir drúgva kjakið um vakstraætlan fyri Suðuroynna, eiga at hava eina grundaða vón um eina slíka og eg vóni at landsmyndugleikarnir lesa støðuna í tí ljósinum.

Fari tí at loyva mær alment at spyrja tey bæði Bjørt Samuelsen og Kára P. Højgaard, um samtykta lógin um Sandoyartunnil, í teirra verð, er at meta sum ein grundað vón hjá Sandoyingum um ein undirsjóvartunnil. Loyvi mær at spyrja, tí at júst hesi bæði, hvør í sínum lagi, hava havt stóra ávirkan á lagnuna hjá samtyktu lógini um Sandoyartunnil.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]



**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.


**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.